# Grønlendsk vitjan í Vági




**Hósdagin stevndi stásiligt far inn á Vág**

VITJAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hósdagin vitjaði grønlendski rækjubáturin Qaqqatsiaq á Vági. Talan er um stásiligt far. Orsøkin til vitjanina var, at fleiri vágbingar sigla við skipinum, sum er ávegis aftur til Grønlands, eftir at hava verið á skipasmiðju í Danmark.

Støðgurin í Vági var eisini orsakaður av, at skipið tók nýggjar trollemmar umborð frá lemmavirkinum í Vági.




## Verkfrøðingur / byggifrøðingur / arkitektur

Til teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu er eitt starv sum verkfrøðingur/ byggifrøðingur/arkitektur leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávur:**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru:

- Útstykkingar
- Nýgerð og umvæling av vegum og kloakkum
- Havnabygging
- Útbygging og viðlíkahald av vatnverki
- Nýgerð og umvæling av kommunalum bygningum
- Byggimálsviðgerð

**Førleikakrøv:**
Søkt verður eftir verkfrøðingi/ byggifrøðingi/arkitekti sum sjálvstøðugt kann arbeiða við projektering og eftirliti v.m. innan nevndu virkisøki.

Tekniarbeiði verður gjørt á MicroStation forriti.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir saman við prógvum og upplýsingum um lívsroyndir skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 10. januar 2006 kl 16.00 á adressuni

Fuglafjarðar kommuna
Tekniska deild
Postboks 30
530 Fuglafjørður

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær Pætur Joensen, býarverkfrøðing, tlf. 444006, lokal 17, e-postur: patur@fuglafjordur.fo

Fuglafjarðar kommuna




# AFS'ari vitjar aftur á slóðina

**Hesa vikuna hevur Nino Barbuzza úr Italia vitjað aftur í Vági. Fyri tveimum árum síðani var hann skiftisnæmingur í Vági eitt stutt skifti, tí upprunaliga ætlaði hann sær til Danmarkar og hevði ikki hoyrt um Føroyar**

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nino Barbuzza var í Føroyum sum skiftisnæmingur fyri tveimum árum síðani. Men bert frá juli til november, tí hann vildi heldur sleppa til Danmarkar, sum upprunaliga ætlað.

Men komin til Danmarkar angraði hann skiftið, men ov seint var at venda aftur til Føroya, tí loyvt er bert at skifta einaferð.

Men Nino hevði ongantíð hoyrt um Føroyar og var ikki til reiðar at koma til Føroya, ístaðin fyri til Danmarkar.

Tí vitjar hann hesa vikuna aftur í Føroyum, fyri at síggja landið við nýggjum, og uppløgdum eygum.

Hann hevur hesi farnu árini hildið sambandið við vertsfamiljuna, Harriet og Erhard Joensen, við telduposti og telefonsamrøðum.

**Øðrvísi**

– Hóast árstíðin er myrk og køld, so er hetta júst tað, ið eg alla tíðina leitaði eftir, tí hetta er so øðrvísi frá tí, ið eg eri vanur við í heimstaði mínum Palermo, sigur Nino.

Nino gongur nú á lærda háskúlanum í Rom, har lesur innan miðlar og sjónvarp.

– Eg havi longi tosað um at koma hendavegin og nú gjørdi eg bart. Men tað var ein drúgv ferð. Tveir dagar og tvey flogfør, ein ferja og ein bussur, greiðir Nino frá.

Hann heldur, at um tað ber honum til, so vitjar hann aftur í frítíðini í desember komandi ár.

Harriet Joensen sigur, at tað er ein góð kensla at fáa Nino aftur á vitjan, tí hann er ikki ein fremmandur, men ein partur av familjuni.

Nino fór avstað aftur úr Føroyum sunnudagin, men ferðaætlanin er so, at hann má úr Suðuroynni longu leygardagin.


**Manglar tær sleipikrók? Ring til okkara!**




**STUBBIN**
Fjarðarvegur 12, 350 Vestmanna
Tlf. 471 800 / 218 540